# Svumu í Havn




*80 svimjarar úr seks feløgum tóku lut, tá svomið varð í Havn um vikuskiftið*
*Mynd: Øssur Mohr*

**Seks feløg við íalt 80 svimjarum tóku lut í svimjikappingini, sum varð hildin í Havn um vikuskiftið**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Hetta vikuskiftið varð svomið í Havn. Luttakandi feløgini vóru seks í tali. Nevnliga Havnar Svimjifelag, Flot av Toftum, Fuglafjarðar Svimjifelag, Vágs Svimjifelag, Tvøroyrar Svimjifelag og Skeggjar úr Gøtu, Í alt var talan um einar 80 svimjarar, og vóru hesir úr bólkunum 3, 4, 5 og so opni bólkurin. Bólkur 3 eru svimjarar fødd í 91-91. 4 eru tey úr 89-90, 5 eru 87-88 og opni bólkurin eru so tey, sum eru fødd í 1986 og áðrenn hetta.

Av úrslitum var serliga áhugavert, at trý bólkamet vórðu sett, og komu øll hesi í bólki 3. Pauli Øssursson Mohr úr Fuglafirði átti tvey av hesum. Annað í 200 metra frí, har hann svam í tíðini, 2.19,55 og hitt í 400 metra frí. Har var tíðin 4.59,86. Triðja bólkametið átti Elspa Mørkøre úr Skeggjum. Hon svam 100 metra blandaða svimjing í tíðini 1.15,98.

Samlaða býtið av heiðursmerkjum í kappingini var annars hetta:

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| 1 Havnar Svimjifelag | 40 | 29 | 14 |
| 2 Tvøroyrar Svimjifelag | 13 | 7 | 7 |
| 3 Fuglafjarðar Svimjifelag | 13 | 3 | 7 |
| 4 Flot | 11 | 15 | 11 |
| 5 Skeggjar | 5 | 8 | 9 |
| 6 VS | 3 | 4 | 2 |

Næsta svimjikapping verður í Leirvík í vikuskiftinum 8. og 9. nov. og kallast henda kapping Reka-stevna. Henda kapping er fyri yngru svimjararnar t.v.s. bólk 1-2 og 3.

Næsta svimjikapping fyri teir eldru svimjararnar verður í Vági 29. og 30. nov.

### Landsliðið úttikið

Annars verður landsliðsvenjing fyri A-landsliðið komandi vikuskiftið í Vági. Her hava 18 svimjarar fingið boð. Tey eru Andrass Thomsen, Janus T. Olsen, Dia Jacobsen, Jóannes á Fløtti, Hanus Eysturdal, Egil Gunnarson, Aksal Holm Norðfoss, Rannvá Jacobsen, Lisbeth L. Joensen, Helga Djurhuus, Annika Jacobsen og Elida Bjarnadóttir úr Havnar Svimjifelag. Sheila Millum Garðarnar og Sára Ejdesgaard úr Tvøroyrar Svimjifelag. Per S. Hansen og Beinir Danielsen úr Flot og Jákup Øssursson Mohr og Sonni Eliasen úr Fuglafjarðar Svimjifelag.

# Tromsø víðari

**Rúni Weihe og liðfelagar hansara megnaðu at vinna sær næstfremsta plássið í Top Teams Cup. Holte við Bárði Mikkelsen mátti siga farvæl eftir hetta umfarið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Um vikuskiftið varð næsta umfarið í Top Teams Cup kappingini í flogbólti leikt. Hendan kapping er at rokna sum Europa-Cup kappingin í flogbólti, og úr einum føroyskum sjónarhorni var hugaligt at staðfesta, at ikki færri enn tvey útisetalið vóru við.

Í Finnlandi vóru Runi Weihe og Tromsø í bólki við vertunum úr Tampere og so einum moldaviskum og einum írskum liði. Mett varð undan hesum, at Tromsø var nóg sterkt til at vinna sær næst fremsta plássið í bólkinum, og hetta vísti seg eisini at halda.

Dysturin móti moldaviska liðnum varð mettur sum lykladysturin her, og tað eydnaðist eisini Rúna og teimum at vinna hendan. Írskur flogbóltur er á væl lægri støði enn norskur, so her hevði Tromsø ongar trupulleikar, meðan teir hinvegin ongan møguleika høvdu móti finsku vertunum.

Við øðrum plássinum heldur Tromsø sostatt fram í Europa, men nú er talan so um CEV Cup. Hendan kappingin er at rokna sum UEFA-Cup kappingin í fótbólti. Ein trupulleiki her kann tó verða, hvørt Tromsø yvir høvur hevur ráð at taka lut. Til dystirnar í Finnlandi hevði felagið bert ráð at senda níggju leikarar avstað, men við Útvarpið sunnudagin helt Rúni Weihe tó fyri, at tey í felagnum roknaðu við, at tað skuldi bera til fíggjarliga eisini.

### Holte tapti

Eisini Holte við Bárði Mikkelsen var sum sagt partur í Top-Teams kappingini, men her gekk ikki eins væl.

Holte var í Letlandi, har dystir skuldu leikast móti einum letlendskum, einum ungverskum og einum svenskum liði, og Bárður og teir taptu í øllum trimum førum. Serliga móti letlendska liðnum var talan um greitt tap, tó at Holte í øðrum setti var væl við. Dysturin móti ungverska liðnum endaði somuleiðis 0-3, meðan tað hinvegin eydnaðist Holte at taka eitt sett móti svium. Hetta minkaði munin til 1-2, men við einum 25-23 sigri í seinasta settinum megnaðu sviar so kortini at taka stigini, so í hesum umfarinum bleiv talan um eitt skjótt farvæl til Holte.

# Stevnuskráin klár

**Róðrarsamband Føroya hevur gjørt av, hvussu stevnurnar skulu rógvast komandi ár**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*

Sum vant verður byrjaði við norðoyastevnu og enda á ólavsøku. Í so máta er talan ikki um broytingar av nøkrum slag í róðrarárinum, men hartil eru so fimm aðrar FM-stevnur, sum allar hava skiftandi heimstað.

Í ár verður tað so Runavík, sum fær eystanstevnuna. Hvalvíkingar fáa sundalagsstevnuna. Jóansøkan verður í Vági. Fjarðarstevnan verður fyri fyrstu ferð í Vestmanna og endaliga verður vestanstevna í ár hildin í Sørvági. Tosað hevur áður verið um, at leggja eina stevnu millum vestanstevnu og ólavsøku, men hetta er so heldur ikki gjørt í ár. Einamest, tí róðrarsambandið hevur ynski um avlopstíð her, skuldi tað borið soleiðis á, at onkur róður má útsetast.



*Róðrarsambandi hevur nú boðað frá, hvussu skráin fyri ymsu FM-stevnurnar verður komandi ár*

Samlaða skráin fyri árið er annars hendan:
5. juni
norðoyastevna, Klaksvík
12. juni
eystanstevna, Runavík
19. juni
sundalagsstevna, Hvalík
26. juni
jóansøka, Vágur
3. juli
Fjarðarstevna, Vestmanna
10. juli
vestanstevna, Sørvágur
28. juli
ólavsøka, Tórshavn



# Óvæntaður lúsingur til unglingarnar

**Føroyska U–19 landsliðið fór í 2. hálvleiki ímóti Makedonia niður við nakkanum, og so gjørdist talan um 4–0 tap í avbjóðingini, har tað var vónað, at Føroyar skuldu fáa stig**

U–19 EM UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*

Lagið er einki serligt í føroysku fótbóltsleguni í Skotlandi. U–19 árgangurin, sum nú er í Skotlandi og spælir ímóti Skotlandi, Makedonia og Turkalandi, hevur verið roknaður at vera ein tann besti nakrantíð. Besti møguleikin fyri at fáa stig varð mettur at vera ímóti Makedonia. Tann dysturin varð spældur mánakvøldið, og tað miseydnaðist fullkomuliga hjá føroysku dreingjunum.

Makedonia vann 4–0, eftir at teir høvdu verið á odda 1–0 í steðginum. Málið í 1. hálvleiki fingu teir í 27. minutti eftir innlegg úr vinstru og stútara. Í 2. hálvleiki fingu teir trý mál. Øll vórðu skorað eftir hornaspark. Í tveimum førum var føroyski málverjin óheppin at missa bóltin, og í triðja førinum varð drønstútað, eftir at bólturin hevði skrúvað burtur frá málinum.

– Talan var um stórt vónbrot. Mótstøðuliðið var væl veikari, enn skotska liðið, sum vit leygardagin taptu ímóti við tveimum málum. Okkara avrik hesa ferð kunnu vit á ongan hátt vera nøgdir við. Í 2. hálvleiki var avrikið á ongan hátt nóg gott. Talan var um kollektivan offday, sigur Jógvan Martin Olsen úr Glasgow. Hann iðrar seg ógvuliga nógv. Eftir at hava verið við í tíggju ár, hevur hann nógvar royndir, og hann heldur, at møguleikarnir sjáldan hava verið so góðir, sum teir áttu at havt verið ímóti Makedonia.

– Eg havi fleiri ferðir sagt, at U–19 liðið hesa ferð hevur verið evnaríkt sum sjáldan, og at tað hevur verið hugaligt, at breiddin hevur verið so stór. Tíverri fingu vit ikki gagn av hesum, tá ið tað galt. Ingi Højgaard, og Kristian Anton Andreasen eru ikki við, tí teir hava verið skaddir. Rasmus Nolsøe og Poul N. Poulsen vóru leikbannaðir ímóti Makedonia. Bergur Midjord og Bárður Olsen vóru so mikið skaddir ímóti Skotlandi, at teir ikki fingu spælt ímóti Makedonia, men Bárður noyddist á vøllin síðsta korterið, tí tríggir spælarar noyddust at fara út, tí teir vóru skaddir.

Teir, sum noyddust at fara út, vóru Símun Samuelsen, sum hevði influensu í vikuskiftinum, Páll D. Joensen, og Hanus Thorleifsson.

Tað ber ikki til at siga, at málini hjá Makedonia komu eftir upplagdar møguleikar. Umframt málini, so høvdu makedonar bara eina rættuliga skotroynd ímóti føroyska málinum. Føroyska liðið hevði einki at bjóða uppá í álopsspælinum.

Dysturin varð spældur á St. Mirren stadion. Í hinum dystinum spældu Turkaland og Skotland 1–1.

Í kvøld fer føroyska liðið at spæla síðsta dystin. Hann verður ímóti Turkalandi. Kl. 11 í gjár vandi føroyska liðið. Takið er nú at fáa mót av nýggjum. Føroyska liðið kann ugga seg við, at dysturin í kvøld verður síðsta uppgávan hjá nøkrum føroyskum fótbóltsliði í ár. Ferðalagið kemur aftur í Vágar í morgin.

**Makedonia–Føroyar 4–0 (1–0)**
Føroyar: Gunnar Nielsen, Frem – Jónas Þór Næs, Frem, Jákup Olsen, VB, Marni Djurhuus, EB/-Streymur, Hanus Jacobsen, GÍ – Jústinus R. Hansen, NSÍ, Kjartan M. Højgaard, Vejle, Høgni Madsen, GÍ, Hanus Thorleifsson, Skála (Bárður Olsen, EB/Streymur, 75.) – Páll M. Joensen, HB (Magnus Skoralíð, GÍ, 65.), Símun Samuelsen, GÍ (Rókur Jespersen, HB, 50.)

## Rætting

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at føroyska manslandsliðið í hondbólti skal spæla tveir venjingardystir móti donskum liði. Í hesum sambandi nevndu vit, at dystirnir verða hós- og fríggjakvøldið klokkan 20.30, men hesar tíðir eru ikki tær røttu.

Hondbótlssambandið hevur nú boðað frá, at dystirnir verða í Klaksvík hósdagin kl. 19.30 og í Vestmanna fríggjadagin kl. 19.30. Altso eru hesir framskundaðir ein tíma í mun til tað, sum nevnt var í týsdagsblaðnum.

**-jm**

# Gestir taka upp í Danmark



**Í hesum døgum er føroyski tónleikabólkurin Gestir í Lundgaard Studio í Danmark og tekur upp**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Tá ið Gestir fyrr í ár vunnu Prix Føroyar tónleikakappingina var ein av vinningunum ein vika í Lundgaard Studio í Danmark.

Og í hesum døgum eru Gestir í kenda danska studionum.

Upptøkurnar byrjaðu leygarmorgunin, og arbeiðið heldur fram til leygarkvøldið.

Tað er Mentamálaráðið, sum hevur latið hendan vinningin, og Norðurlandahúsið og Atlantic Airways taka sær av ferðingini aftur og fram.

Studio 1 í Lundgaard verður mett sum eitt av bestu upptøkuhølunum í Danmark, og tað er her at Gestir halda til.

# Fyrilestur um útlitini í Suðuroynni

**Í kvøld, mikukvøldið, klokkan 19 verður almennur fyrilestur í Stóra Pakkhúsi í Vági, har Magni Laksafoss heldur fyrilestur um fram tíðarútlitini í Suðuroynni**

SAMFELAGSVIÐURSKIFTI
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Búskaparfrøðingurin Magni Laksafoss heldur fyrilestur í Stóra Pakkhúsi í Vági í kvøld, 29. oktober, klokkan 19:30. Fyrilesturin er almennur Vinnuráðið í Vági skipar fyri..

Fyrilesturin fevnir um søguligu gongdina í Suðuroynni, umframt gongdina tey seinastu fimm árini. Eisini fevnur fyrilesturin um framtíðarútlitini fyri Suðuroynna - og hartil framtíðarútlini fyri Suðuroyar sunnaru helvt, nú alivinnan, sum seinastu árini hevur verið høvuðsvinnan í økinum, er í svárum trupulleikum. Magni Laksafoss kemur eisini inn á nakrar loysnir á trupulleikunum, bæði uppá styttri og longri sikt, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

Sosialurin
www.sosialurin.fo